# Skúladepilin verður miðdepil fyri alt miðnám

**Páll Isholm, rektari á Handilsskúlanum á Kambsdali, er sannførdur um, at tá nýggi skúladepilin – saman við Skálafjarðartunlinum – er komin, verður Skúladepilin við Marknágil miðdepilin fyri alt miðnám í Føroyum. – Tað verður betri og effektivari, og hinir skúlarnir mugu velja sær ávís øki, ímyndar hann sær**



MARKNAGIL
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Vit skriva 2020. Skálafjarðartunnilin er liðugur, skúladepilin við Marknagil hevur fungerað í nøkur ár, upptøkuøkini til studentaskúlan eru burtur og við útbyggingunum er blivið styttri av Nesi til glæsiliga skúlan í Havn enn til skúlan á isoleraða Kambsdali.

Allur skúlaskapur í Føroyum er broyttur. Skúlarnir kring landið hava allir valt sær serlig fokusøki. Á Kambsdali eru altjóðagerð og ítrótt høvuðsevnið, Vestmanna heldur fast við sína fiskivinnu og í Klaksvík halda mikrobiologarnir til.

Í stóra skúlanum í Havn eru fleiri fokusøki millum teir næsta 2000 næmingarnar, og einasta orsøkin til, at ikki øll ganga í Havn er, at hinir skúlarnir ikki gera sum tey gera við Marknágil.

Nakað soleiðis ímyndar Páll Isholm, rektari á Handilsskúlanum á Kambsdali, at føroyskt miðnám fer at vera í 2020.

Hann vil tó ikki fara í detaljur við til dømis Suðuroynni, men vil heldur vísa á, at alt verður broytt, og dugir at síggja, at nógvar generellar broytingar verða gjørdar.

## Vilja til Havnar

Páll Isholm minnir tó á, at hann ikki sær tað sum ein trupulleika á nakran hátt, at nýggi skúladepilin verður gjørdur, tí skúlin fer at skapa eina stóra menning av øllum miðnáminum í Føroyum.

– Tað fer at gera, at tað vera færri dupultfunktiónir, og tað ger allan rakstur bíligari og allir næmingar fara at fáa eitt sterkari tilboð, heldur Páll Isholm.

Hann leggur afturat, at tað sjálvandi verður soleiðis, at heilt nógvir næmingar vilja til Havnar at ganga í skúla, tí har er eitt sentralt skúlaumhvørvi – á sama hátt, sum tá studentaskúli bara var í Hoydølum.

– Men natúrliga fylgjan av hesum er, at hinir skúlarnir velja sær serlig øki, sum teir fokusera uppá, sigur rektarin á Handilsskúlanum á Kambsdali.